gult cyan magenta svart



# Marknaðarleiðari søkist

Rás 2 søkir eftir einum fólki at umsita marknaðardeildina. Arbeiðið fevnir um marknaðarføring, sølu, tilboðsveiting, umsiting av lýsingaframleiðslu og debitorbókhald.

Søkjari skal hava hollan málsligan kunnleika í skrift og talu. Søkjarar við royndum frá líknandi arbeiði hava fyrimun.

Fyri rætta søkjaran er talan um eitt vællønt starv í nýggjum og spennandi umhvørvi.

Umsóknir skulu vera Rás 2 í hendi innan 15. september. Hava tit hug til eina samrøðu, ring á tel. 35 99 99 og avtala tíð við Petur ella Óla Jákup.

Rás FM 102 FM 107

Rás 2 er ein privat rikin útvarpsstøð, sum eftir 1. oktober hoyrist av 90% av landsins íbúgvum. 8 fólk starvast fast á Rásini, umframt 22 free-lancarar. Rásin er óheft politiskt og trúarliga, fær ongan almennan stuðul, og hevur ikki heimild at krevja lurtaragjald. Rásin hevur høvuðsskrivstovu og 4 studio á Hoyvíksvegi 61 í Havn, umframt studio á Rygsvegi 3 í Klaksvík og eitt mobilstudio.

# Datanom

Í heyst verður grundskeið í Datanomútbúgvingini. Endamálið við skeiðnum er at geva tær innlit í høvuðsumráðini í menning av dataskipanum og forritan eins og onnur datamatisk hugtøk, so tú verður førur fyri at fylgja undirvísingini í teimum ymsu lærugreinunum á teimum ymsu breytunum. Samlaða undirvísingartímatalið er 48 skúlatímar. Freistin at tekna seg er 15. september. Undirvísingin byrjar 20. september og prógvtøkan verður í januar 2001. Kostnaðurin er 2250 kr. Meira fæst at vita við at fara á heimasíðuna **heima.olivant.fo/~jonsen/datanom** ella venda sær til skúlan.

Føroya Handilsskúli

# 2 Deutz luftkøldir V8 motorar

**188 KW - 256 HK**
**Typa F8L 413 F**

Spildurnýggir, ongantíð brúktir. Vælegnaðir sum hjálpimotorar.

Verða seldir fyri 80.000,- kr. hvør ella 150.000,- kr. fyri báðar.

**Ring tel 316025 - eftir kl. 18.00**

# Maskinmeistari søkist til til Elfelagið SEV

Eitt starv sum maskinmeistari á Sundsverkinum er leyst at søkja.

Við tað at Sundsverkið er í rakstri alt samdøgrið alt árið krevur starvið, at viðkomandi er til reiðar bæði á ataka sær alt vanligt dagligt viðlíkahaldsarbeiði í samstarvi við manningina á Sundsverkinum annars, og eisini at luttaka sum hjálparmaður (2. maður) á vakt uttan fyri vanliga arbeiðstíð.

Tað er ikki eitt krav, at viðkomandi hevur fulla maskinmeistaraútbúgving, men kundu vit hugsað okkum, at umsøkjararnir hava í minsta lagi tvey ára maskinmeistaraskúlaprógv ella javnbjóðis førleika. Royndir innan maskinmeistarayrkið eins og full maskinmeistaraútbúgving geva umsøkjarum fyrimun.

Lønin verður sambært sáttmála millum SEV og Maskinmeistarafelagið í 3. lønarflokki.

Nærri upplýsingar um starvið fáast við at venda sær til Osvald Hansen, verkmeistara á Sundsverkinum ella til Bjarka Hermansen ella John P. Danielsen á skrivstovu okkara í Havn, telefon 311366.

Umsóknir saman við avriti av prógvum og møguligum ummælum skulu sendast til Elfelagið SEV, Postrúm 319, FO-110 Tórshavn og skulu vera SEV í hendi í seinasta lagi tann 27. september 2000.

*Tórshavn, tann 5. sept. 2000*

**Elfelagið SEV**

# Søkt verður eftir dagrøktarmammum

Í sambandi við at skipað verður fyri dagrøkt í Sumbiar kommunu, verður hervið søkt eftir dagrøktarmammum.

Umsóknirnar mugu vera bygdarráðnum í hendi í seinasta lagi tann 15. september 2000.

**Sumbiar kommuna**
Tlf. 370344 og fax 370114

# DANNY TRANSPORT

- tá okkurt skal koyrast ella goymast

**Tlf. 319192**

# Sølufólk søkist

Vit sóknast eftir sølufólk til gólvdeild okkara í Vøruhúsinum á Hjalla. Eru spurningar hesum viðvíkjandi, kunnu tygum venda tygum til deildarleiðaran, Sólbjørn Thomsen, tlf. 342500.

Skrivlig umsókn í seinasta lagi mánadagin 11.9.2000.



**Vøruhúsið á Hjalla**
Postboks 1019
110 Tórshavn

# VØRUKOYRING/ FLOGFRAKT



SAFARI TRANSPORT
www.safari.fo

Sosialurin - 311820

GREIÐA ALLAN FLUTNING & ØLL PAPPÍR

**Tel. 32 22 22**

**Skráseting Føroya hevur í dag skrásett ni›anfyri standandi frábo›an:**

Skrásetingar-nr. Sp/f 2664, **Sp/f LIDO Seafood, 220 Skálavík.**

**Vi›tøkur broyttar:** 18.06.2000.
**Kapitalur:** Hækking vi› kr. 900.000,00 til kr. 2.200.000,00
Inngjaldingarháttur: Kontant kr. 600.000,00 til kurs 100 og kr. 300.000,00 vi› skuldarumskifti til kurs 100.
**Nevnd:**
Farin úr nevndini: Joen Hendrik Elias Egholm Olsen, 220 Skálavík (forma›ur), Joen Peter Petersen, Flatnager›i 19a, 100 Tórshavn og Birgir Sondum, Brekkugøta 5, 100 Tórshavn.
Innkomin í nevndina: Jógvan Sundstein, Skáki› 9, 100 Tórshavn (forma›ur),Dánjal Petur Olsen, Vegavænget 19, DK-2620 Albertslund og Ejler Jacobsen, Marknagilsvegur, 100 Tórshavn.
**Stjórn:**
Farin frá sum stjóri: Dánjal Petur Olsen, M‡risnípuvegur 36, 100 Tórshavn.

Skráseting Føroya tann 4. september 2000

Kristin Balle

**Skráseting Føroya hevur í dag skrásett ni›anfyri standandi frábo›an:**

Skrásetingar-nr. Sp/f 2902, **Sp/f TeleTænastan, 470 Ei›i.**

**Vi›tøkur broyttar:** 02.08.2000.
**N‡tt navn:** P/F TeleTænastan
**Kapitalur:** Hækking vi› kr. 420.000,00 til kr. 500.000,00
Inngjaldingarháttur: Kontant kr. 420.000,00 til kurs 100
**Nevnd:**
Innkomin í nevndina: Svein Askildsen, Valdemarsvej 315, DK-7400 Herning (forma›ur), Kristján Gíslason, Sævi›arsund 95, 104 Reykjavík og Billy Hansen, 470 Ei›i.
**Tekningarreglur:** Felagi› ver›ur tekna› av stjóranum ella av allari nevndini í felag.

Skráseting Føroya tann 5. september 2000

Kristin Balle

**Norðurlandahúsið í Føroyum**

*Sí SVF tekstvarp s. 650*



# DEILDARLEIÐARI á Sýnsdeildini

Av tí, at ov fáar umsóknir komu til starvið, verður søkt av nýggjum eftir deildarleiðara til Sýnsdeildina á Bileftirlitinum til setan skjótast gjørligt.

**Starvslýsing:**
Deildarleiðarin hevur mótvegis stjóra stovnsins ábyrgd av Sýnsdeildini og er partur av leiðslubólkinum á stovninum. Deildarleiðarin skal mótvegis stovnsleiðsluni, trúfast og samvitskufult umboða áhugamál stovnsins.

**Deildin umfatar:**
- regluligt sýn og umsýn
- tekniskar kanningar og uppmátingar av akførum
- skrásetingarsýn av lastbilum og bussum
- dagføring av lógum og kunngerðum og reglugerðum á biltekniska økinum
- umsiting av floksgóðkenningum og meginfloksgóðkenningum
- tekniskar lýsingar og kravfestingar fyri akfør
- tekniskar kravfestingar fyri eftirlitsarbeiðið
- dygdartrygging av eftirlitsarbeiðinum
- útbúgving av starvsfólki í sýnsdeildini
- umsjón og viðlíkahald av sýnshøllum og útbúnaði stovnsins
- viðlíkahald av tænastuakførum
- góðkenning og eftirlit við bilverkstøðum til umsýn
- samstarv við Bileftirlit í hinum norðurlondunum
- annað norðurlanda samstarv

Umframt deildarleiðaran, starvast í Sýnsdeildini í løtuni 4 sýnsmenn, sum vísa til deildarleiðaran.

**Førleikakrøv:**
Tann, sum settur verður í starvið, skal ástøðiliga vera tekniskt væl fyri, so sum verkfrøðingur ella maskinmeistari, hava drúgvar royndir á biltekniska økinum, góð samstarvs- og leiðaraevni og kunna arbeiða sjálvstøðugt.

**Setanartreytir:**
Starvið verður lønt eftir sáttmála millum Fíggjarmálastýrið og viðkomandi fakfelag. Starvssetanin hoyrir undir Vinnumálastýrið við tilhoyrandi stovnum, umframt Løgmansskrivstovuna og onnur aðalstýri.

Fleiri upplýsingar um starvið kunnu fáast við at venda sær til Jákup Jacobsen ella Hans J. Stenberg á tlf. 350 400. Umsóknir saman við prógvum og viðmælum skulu vera okkum í hendi í seinasta lagi 18. september 2000.

**Bileftirlit Føroya**
Hoyvíksvegur 57
Postsmoga 3206
110 Tórshavn

*Bileftirlit Føroya er stovnur undir Vinnumálastýrinum og hevur sum endamál at fremja akfaratøkniligar kanningar og akfaraeftirlit, stíla fyri koyriroyndum, útvega fólki koyrikort, umsita skráseting av koyrikortum og umsita akfaraskráseting. Stovnurin er skipaður í 3 deildir. Umframt høvuðssæti í Tórshavn, hevur stovnurin sýnsdeildir um alt landið. Á Bileftirlitinum starvast 17 fólk.*

# Fiskamerkir

Seinasta freist at lata fiskamerkir inn, sum skulu luttaka í lutakasti um 10000 kr., er 18. september 2000.

**Fiskirannsóknarstovan**
Nóatún, Postrúm 3051
FO-110 Tórshavn
Tlf. 315092, Fax 318264

# Fartelefon

*Nokia 7110*



Prísur v/MVG **Kr. 2.995,-**

Sp/F Teldu Tænastan
Telefon 317620 - www.tt.fo

# EDV-fólk

Føroya Shell sóknast eftir einum dugnaligum fólki at taka sær av KT-uppgávum. Starvið er fjøltáttað og útbúgvingarmøguleikarnir góðir.

**Arbeiðsøki**
Í høvuðsheitum fevnir arbeiðsøkið um:

- servararakstur og viðlíkahald
- hjálp og vegleiðing til brúkarar, bæði hvat teldum og forritum viðvíkur
- installatiónsuppgávur
- dátugrunnafyrispurningar
- umsiting av trygdarskipanum
- umsiting av intraneti
- dokumentatión
- støðugt vera við til at menna KT-umhvørvið
- luttøku í nýggjum verkætlanum.

**Førleikakrøv**
Vit hugsa okkum at tú:

- hevur hóskandi EDV-útbúgving
- hevur kunnleika til netskipanir
- hevur kunnleika til dátugrunnar
- dámar væl at veita góða tænastu
- hevur góð evni til at arbeiða sjálvstøðugt og miðvíst
- setir arbeiðsgleði og gott sinnalag í hásætið.

**Vit bjóða:**
- góð arbeiðsviðurskifti
- góða løn við eftirlønaskipan í samsvari við útbúgving og royndir
- góðar møguleikar fyri persónligari og fakligari menning.

**Áhugað/ur?**
Hevur hetta tín áhuga, so send okkum eina umsókn innan 22. september. Allar umsóknir verða viðgjørdar í trúnaði. Nærri upplýsingar um starvið fáast við at venda sær til Palla Petersen á tel. 34 74 00. Bústaðurin er:

**P/F Føroya Shell, Postbox 188, FO-110 Tórshavn**

Shell




# Ljóð-útgerð

til brúdleyp, føðingardagar o.a. til leigu.

Eisini fæst videokanón og ljós sera bíliga.

**Intro**
*v/Dánjal Petersen*
*Gæsugøta 9*
*100 Tórshavn*
*Telefon 22 18 85*

# BILSMIÐJULÆRLINGUR SØKIST

Søkt verður eftir lærlingi til mekaniska verkstað okkara.

Ert tú ágrýtin við áræði og hug til útbúgving innan bilhandverki, so ert tú møguliga tann vit leita eftir.

Vit bjóða tær lærutíð á sera framkomnum verkstaði við øllum nútímans hentleikum og góðum arbeiðsumhvørvi.

Hevur tú 10. floksprógv folkaskúlans og/ella SIT prógv og helst koyrikort - so send okkum skrivliga umsókn sum skjótast.

P/F Wenzel – Ford í Føroyum
Att.: Anthonius Dalsgaard, verkførari
Akranesgøta 5
100 Tórshavn

Sosialurin - 311820

**P/f Wenzel**

Akranesgøta 5 - FO 100 Tórshavn - Tel. 313873
Fax 311173 - Heimasíða: www.wenzel.fo

gult cyan magenta svart